
TRYGDARÚTGERÐ,
FALLHJÁLMAR
OG HÆGRI BØTUR



## TRYGDAARÚTGERÐ, FALLHJÁLMAR OG HÆGRI BØTUR

# FERÐSLULÓGIN

**Tilsamans 41 broytingar í ferðslulógini koma í gildi 1. oktober. Tað snýr seg um alt frá allýsing av traktorum og strangari reglum um rúsdrekkakoyring til neyvari krøv um trygdarútgerð til børn og hægri bøtur fyri brot á ferðslulógina.**

Tað er ikki bert reglurnar um rúsdrekkakoyring, sum verða broyttar 1. oktober. Talan er um hópin av øðrum broytingum, sum hava størri og minni ávirkan á ferðsluna. Her eru nakrar av broytingunum, sum kanska fara at merkjast mest.

### Krøv um hjálmglugga (visir)

Nýggj krøv verða sett teimum, sum koyra á motorsúkklu. Nú skulu førarin og tey ferðandi vera í fastspentum fallhjálmi við hjálmglugga. Hevur hjálmurin ikki hjálmglugga skulu verdnarbrillur nýtast í staðin.

Hetta nýggja kravið er komið fyri at verja eyguni, t.d. móti steinsløgum og skal tryggja, at sýnið er so gott sum tilber, tí tað er avgerðandi fyri trygdina.

Sum nakað nýtt kann landsstýrismaðurin við kunngerð áseta reglur um trygdarbúna og aðra útgerð hjá teimum, sum koyra motorsúkklu. Av tí, at útgerðin hjá motorsúkklukoyrarum, t.d. ryggstuðul, hevur stóran týdning, tá ið vanlukkur henda, verður mett, at serligar reglur eiga at verða gjørdar á hesum øki.

### Trygdarbelti

Trygdarbelti hevur stóran týdning fyri ferðslutrygdina. Tí verða reglurnar herdar á hesum øki og verða skipaðar í eina lógargrein fyri seg.

Høvuðskravið er, at tann sum situr í setri, har trygdarbelti er, hevur skyldu at nýta beltið. Saman við trygdarbeltinum kann eisini selakoddi verða nýttur.

Tað verður framhaldandi einki krav, at øll, sum ferðast í bili skulu nýta trygdarbelti. Eldri bilar, sum eingi trygdarbelti hava, sleppa undan kravinum um trygdarbelti. Talan kann tildømis vera um ellisakfør.

Men í bilum við trygdarbelti er hinvegin eingin bøn. Har ber einans til at nýta tey setur, sum hava trygdarbelti. Eru setur í bilinum, sum eingi trygdarbelti hava, er ikki loyvt at sita í teimum.

Til dømis kann ein familja, sum telur fimm fólk ikki koyra saman, um so er at tað bert eru fýra setur við trygdarbeltum í bilinum. Í slíkum førum er tó ein skiftisregla, sum merkir, at familjan fær freist til 1. januar 2012 at skifta bilin út við ein størri. Í skiftitíðini kunnu tey hava eitt størri tal av ferðandi á baksetrinum enn talið á sitiplássum við trygdarbelti.

### Trygdarútgerð til børn

Royndinar vísa, at nógv børn sita leys í bili. Hesi gongd verður nú roynt at venda við at áseta neyvari og strangari reglur um børn og trygdarútgerð.

Reglur um trygdarútgerð til børn eru nú skipaðar sum egin lógargrein, ið ásetur, at børn, sum eru minni enn 135 cm skulu nýta góðkenda trygdarútgerð. Hendan útgerð skal verða lagað til hvussu høgt barnið er og hvussu nógv tað vigar.

Børn undir 3 ár kunnu als ikki vera í bili um ikki trygdarútgerðin er lagað til barnið. Børn, sum eru 3 ár og eldri, men undir 135 cm mugu ikki vera á forsetrinum. Eisini tey skulu nýta góðkenda trygdarútgerð, sum er lagað til hædd og vekt hjá barninum. Tá talan er um hissini flutning á stuttum strekki, kunnu børn, sum eru trý ár og eldri, tó verða flutt uttan at nýta góðkenda trygdarútgerð, um barnið situr á baksetrinum í trygdarbelti.

Ein onnur broyting er, at børn kunnu ikki sita í barnastóli, sum vendir aftureftir á einum sessi, ið hevur virknan stoytkodda frammanfyri. Orsøkin er, at stórur skaði kann standast av slíkum stólum, um óhapp hendir.



# TRYGDARÚTGERÐ, FALLHJÁLMAR OG HÆGRI BØTUR

Tað áliggur bilføraranum at tryggja, at børn undir 15 ár nýta trygdarútgerð. Brot á reglurnar geva bót og harafturat fær bilførarin klipp í koyrikortið.

**Ongin má vera í last ella vørurúmi**

Eftir 1. oktober er bannað at hava ferðandi í last- ella vørurúminum á einum akfari. Ásannað verður, at tað skal bert eitt lítið óhapp til, so kann tað fáa álvarsligar avleiðingar fyri ferðandi í einum last- ella vørurúmi.

Landsstýrismaðurin kann tó við kunngerð gera undantøk, so at loyvt verður fólki at vera í last- ella vørurúmi. Tað kann t.d. vera í sambandi við at skúlin endar ella líknandi veitsluhald.

**Bøturnar hækka**

Sektin fyri at bróta ferðslulógina verður hækkað, samstundis sum skipanin við sektum verður gjørd einfaldari.

Meðan flestu prísir eru farnir upp tey seinastu árini hava bøturnar staðið í stað. Hildið verður, at hettar hevur gingið út yvir tað fyribyrjandi ávirkanina, sum sektin er ætlað at hava.

Minstasektin verður nú 500 kr., tó í serligum førum 300 kr. Rætturin tekur endaliga støðu til sektarupphæddina, men tó skal sektin altíð skal kunna býtast við 500 kr.

Møguleiki er nú fyri at bøturnar kunnu leggjast saman. Mett verður, at fyribyrgjandi ávirkanin verður minni um tann, sum fremur fleiri brot á ferðslulóggávuna, skal sleppa bíligari enn ein, ið fær tey ymisku lógarbrotini viðgjørd og dømd hvør sær. Eisini kunnu sektir eftir ferðslulógini leggjast saman við sektum eftir aðrari lóg.

Verða tær samanløgdu sektirnar órímiliga høgar hava løgreglan og dómsvaldið møguleika at minka bøturnar.

Eisini leggur lógin upp til, at fólk, sum eru dømd í fongsul fyri brot á ferðslulógina ella aðra lóg, kunnu fáa sekt eftir ferðslulógini. Ræturin hevur verið afturhaldandi í slíkum málum, men nú er so lógarfest, at fólk kunnu fáa bót omaná ein fongsulsdóm.



